FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Ársfrágreiðing

# 2014

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

J. C. Svabos gøta 14 • Box 272
110 Tórshavn • Faroe Islands • www.setur.fo

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** ..... 2

**Fróðskaparsetur Føroya 2014** ..... 3

**Fyrisitingin** ..... 5

**Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi** ..... 7

**Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi** ..... 11

**Útbúgvingar og lesandi** ..... 14

**Fíggjarviðurskiftir** ..... 16

**Leiðsla og stýri** ..... 17

**Vísindaligar útgávur** ..... 18

*Javnlíkamettar (Peer reviewed)* ..... 18

*Ráðstevnur (Conferences)* ..... 20

*Aðrar vísindaligar útgávur (Other scientific publications)* ..... 20

**Ph.d. verkætlanir** ..... 22

# Inngangur

Føroyska samfelagið stendur fyri stórum avbjóðingum til tess at fasthalda vælútbúgvið fólk. Kanningar vísa, at menn og kvinnur við útbúgvingum savnast í miðstaðarøkjum, har vitan, mentan og kreativitetur verða raðfest. Vit vita frá okkara grannalondum, at økir, sum hava raðfest útbúgving og gransking høgt, mennast og draga til sín ungt fólk, ið vil útbúgva seg. Økta virksemið skapar øktan eftirspurning, sum gevur jaliga ávirkan á samfelagið.

Við Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya vórðu týðandi stig tikin at samskipa hægri útbúgvingar í einum lærdóms- og granskingarmiðdepli, sum skal tryggja samfelagnum og vinnulívinum viðkomandi útbúgvingar og gransking á altjóða stigi.

Málið er, at útbúgvingarøkið í Føroyum skal skipast eftir sama leisti sum í øðrum evropeiskum londum til tess at økja um gjøgnumskygni og eftirlit við útbúgvingardygdini, møguleikan fyri lívlangari læru og flytføri hjá lesandi og granskarum ímillum lond.

Fróðskaparsetrið skal vaksa. Skal Fróðskaparsetrið fáa ta megi og røkka teimum málum, sum eru neyðug fyri at skipa eitt kappingarført altjóða universitet, er neyðugt at Fróðskaparsetrið veksur munandi í vavi. Hetta merkir, at vit skulu hava fleiri lesandi, fleiri vísindafólk og at hølisviðurskiftini skulu nútímansgerast og miðsavnast.

Seinasta árið hevur verið arbeitt við at leggja framtíðarætlanir fyri Fróðskaparsetrið. Arbeiðið hevur fevnt um, hvussu stovnurin kann skipast, um nýggjar útbúgvingar, sum kunnu setast í verk, og um hugsjónarliga og strategiska grundarlagið fyri okkara føroyska universiteti.

Í november 2014 staðfesti stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya 10 ára strategisku ætlanina

*Fróðskaparsetur Føroya – mál og mið (2014-2024)*

ið byggir á hugsjónina um burðardygga menning - og at Fróðskaparsetrið framtíðartryggjar føroyska samfelagið.

*Sigurð í Jákupsstovu,*

*rektari*

# Fróðskaparsetur Føroya 2014

## *Strategi*

Arbeiðið at gera eina felags strategi fyri Fróðskaparsetrið helt fram. Uppskot varð viðgjørt á stýrisfundi í februar. Eftir at skjalið hevði verið í hoyring hjá starvsfólkum á Setrinum, í Mentamálaráðnum og í Vinnuhúsinum, varð strategiskjalið endaliga staðfest á stýrisfundi í november.

## *Lestrarráð*

Hóast avgerð varð tikin í 2013 um at heimila dekanum at stovnseta lestrarráð á deildunum, so gekk drúgv tíð, áðrenn umboð fyri vísindastarvsfólk og fyri lesandi vórðu vald og fyrstu ráðini kundu fara til verka. Søgu- og samfelagsdeildin, Føroyamálsdeildin og Námsvísindadeildin skipaðu allar lestrarráð á heysti í 2014.

Á megindeildini fyri Náttúruvísindi og Heilsuvísindi valdi dekanurin ikki at seta lestrarráð í fyrstu syftu.

## *Útbúgvingarleiðarar*

Útbúgvingarleiðaraskipanin, sum varð sett í verk í 2013, hevur nú virkað í eitt gott ár og skipanin tykist at vera góð. At ein ábyrgdarpersónur er tilnevndur fyri hvørja útbúgving ger, at ábyrgdarbýtið er greiðari enn fyrr og at útbúgvingarnar verða betri skipaðar. Útbúgvingarleiðarauppgávan er lýst í mannagongdini "Lýsing av arbeiðsuppgávum hjá útbúgvingarleiðarum" [1]. Útbúgvingarleiðari er ikki partur av starvsskipanini á Setrinum, men skal ístaðin skiljast sum ein leiklutur ella ein uppgáva, ið vísindastarvsfólk røkja, sum partur av samlaða starvinum. Ikki er greitt, hvussu arbeiðskrevjandi uppgávan er, og tí er normering ikki ásett. Hetta er partur av framhaldandi eftirmeting og nágreining av uppgávuni.

## *Lestrarskrivstova sett á stovn*

Fyri at styrkja um fyrisitingina, so hon megnar at átaka sær øktu arbeiðsuppgávurnar, ið standast av, at Setrið fær alt fleiri útbúgvingar og lesandi, varð lestrarskrivstova sett á stovn á heysti 2014 og leiðari settur á deildini, sum tó ikki fer til verka fyrr enn í apríl 2015, tá væntast kann at rættilig gongd kemur á arbeiðið hjá lestrarskrivstovuni.

## *Bygnaðurin í fyrisitingini broyttur*

Samstundis sum lestrarskrivstovan varð stovnsett, bleiv fyrisitingin á Setursskrivstovuni umskipað, soleiðis at nakrar eindir vóru skipaðar sum stápsdeildir við tilvísing til rektaran. Talan er um fíggjardeildina, KT-tænastuna og lestrarskrivstovuna. Við hesum broytingum er

[1] Skjalið er at finna á heimasíðuni hjá Setrinum. Sí: http://setur.fo/um-setrid/regluverk/

ætlanin at gera starvsprofilin fyri fyrisitingarstjóran greiðari, soleiðis at fokus verður á fyrisitingarligar kjarnuuppgávur.

### *Akademiskt ráð*

Reglugerð fyri Akademiskt ráð varð staðfest á stýrisfundi í februar. Seinni varð skipað fyri vali av limum til Akademiska ráðið og varð fyrsti fundurin hildin í november.

### *Fjarlestur*

Í 2014 varð avgerð tikin um at verkseta royndarverkætlan við fjarlestri – skipað á tann hátt, at lesandi á læraraútbúgvingini kundu sita og fylgja undirvísingini í Runavík, Klaksvík og Skálavík. Royndirnar prógvaðu, at tøknin, bæði mynd og ljóðgóðska, var sera góð og útgerðin einføld at nýta hjá undirvísarunum. Tí varð avgerð tikin um at halda fram við royndarverkætlanini.

### *Uttanhýsis eftirmetingarpanel*

Eftirmetingarpanelið vitjaði Fróðskaparsetrið í mai. Endamálið við vitjanini var at hitta starvsfólk og leiðslu á Setrinum, umframt umboð fyri aðrar áhugapartar hjá Setrinum. Hesir vóru Mentamálaráðið saman við umboðum fyri stýrið, Havstovan, Vinnuhúsið, MAP arkitektar, Granskingarráðið og starvsfólk á Hotel Føroyum.

### *Kunningartøkni*

Sum liður í at skipa eitt trygt og álítandi KT-umhvørvi, varð SPEKT á heysti 2014 biðið um at gera eina KT-váðagreining av Setrinum. KT-leiðarin og umboð fyri leiðsluna luttóku í arbeiðsbólkinum, saman við KT-grannskoðaranum, sum skipaði arbeiðið. Greiningin varð liðug við árslok og er ein lýsing av sannlíkindum fyri vandastøðum, sum brek á KT-skipanirnar kunnu viðføra. Greiningin er amboð hjá leiðsluni at meta um KT-trygdina og tørvin at seta í verk fyribyrgjandi tiltøk.

### *Samstarv*

Í mars vórðu samstarvsavtalur um gransking og útbúgving undirskrivaðar millum Fróðskaparsetrið og Landssjúkrahúsið og millum Fróðskaparsetrið og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Samstarvsstovnarnir fóru við ársenda 2014 í samráðingar við Granskingarráðið og Sjúkrakassagrunnin um verkætlanir innan sonevnda høvuðsøki-3 hjá Sjúkrakassagrunninum

Í september varð Fróðskaparsetrið upptikið sum limur í International Association of Universities[2] og kom á listan yvir góðkend universitet hjá hesum felagsskapi. At Fróðskaparsetrið lýkur krøvini og fær slíkan limaskap, lættir um flytføri hjá lesandi á Setrinum og økir teirra møguleikar at verða upptikin á onnur universitet eftir loknan lestur á Setrinum.

[2] http://www.iau-aiu.net/content/institutions

## Fyrisitingin

### *Lýsing av virkis- og starvsøki hjá deildarskrivstovum*

Lýsing av virkis- og starvsøki hjá deildarskrivstovum varð endaliga samtykt, í hesum sambandi verður arbeitt við at orða/dagføra starvslýsingarnar hjá skrivarunum á deildunum.

### *Uppfylging av trivnaðarkanning*

Í vár varð skipað fyri einari uppfylging av trivnaðarkanningini, sum varð gjørd í 2012. At standa fyri arbeiðinum setti Setrið ein ráðgeva innan organisatiónsmenning. Ein temadagur varð skipaður fyri hvørja deild, har arbeitt varð við trivnaði og at gera virkisætlanir. Til seinast varð skipað fyri temadegi fyri leiðslu og samstarvsnevnd, har arbeitt varð víðari við úrslitunum frá deildardøgunum. Temadagarnir byggja á hugtakið um sosialan kapital.

### *Telduskeið til starvsfólk*

Farið varð undir at bjóða starvsfólkum eina røð av telduskeiðum í Office 2010. Fyrsta skeiðið var í Outlook, sum er teldupost- og kalendaraskipanin hjá Setrinum, ið er áløgd øllum starvsfólkum at brúka og halda viðlíka sum okkara fremsti samskiftismiðil.

### *Setrið tikið undir við Charter & Code*

Sum fyrsti granskingarstovnur í Føroyum hevur Setrið í oktober boðað ES-nevndini frá, at stovnurin tekur undir við Charter & Code, ið snýr seg um reglur og mannagongdir fyri granskarar og granskingarstovnar í Evropa. Endamálið við Charter & Code, ið er stytting fyri ”The European Charter for Researchers and the Code of Conduct for the Recruitment of Researchers”, er at tryggja granskarum somu rættindi allastaðni í Evropa.

### *Spurnakanning millum lesandi á Setrinum*

Mentamálaráðið setti í 2013 eitt panel við útlendskum serfrøðingum at meta um virksemi hjá Setrinum. Panelið ynskti nærri innlit í sjónarmiðini hjá lesandi og tí tók Vegleiðaratoymi, í samstarvi við Ráð teirra lesandi, stig til eina kanning. Endamálið við kanningini er at fáa at vita, hvat lesandi á Setrinum halda um útbúgving, eftirmeting, trivnað og lestrarumhvørvi. Somuleiðis er endamálið at fáa kunnleika um framtíðarætlanir hjá lesandi og um, hvussu tey halda, at Setrið kann mennast.

## *Viðurskiftir hjá lesandi*

### *Ráð teirra lesandi*

Ráð teirra lesandi var valt í 2013 og fór rættiliga at virka í ár. Ráðið umboðar øll lesandi á Fróðskaparsetri Føroya og aðalmálið er at røkja áhugamál teirra lesandi í samstarvi við setursleiðslu, undirvísarar og onnur starvsfólk á stovninum. Ráðið hevur í ár sett sær fyri at skipa eitt betri lestrarumhvørvi og at allar deildirnar skipa hvørt sítt virkið Ráð teirra lesandi, ið arbeiðir fyri áhugamálunum hjá lesandi á teimum ymsu deildunum.

Ráð teirra lesandi skipar javnan fyri Seturscafé fríggjadagar. Endamálið er at lesandi hugna sær saman. Ætlanin er at halda fram við Seturscafé hvørt fríggjakvøld komandi ár.

### *Nýtt kveikjandi lestrarumhvørvi fyri lesandi*

Setrið hevur fingið í lag framleigusáttmála við Eik um leigu av ognini í Bókbindaragøtu 8, frá januar 2014 til apríl 2016. Hølini eru um 770 $m^2$. Hølini skulu m.a. nýtast til kveikjandi lestrarumhvørvi og bólkarúm til lesandi. Á ovaru hæddini eru harumframt skrivstovu- og undirvísingarhølir.

## Merkisdagar og tiltøk

### *Prógvhandan*

Fríggjadagin 27. juni varð fyri fyrstu ferð skipað fyri felags prógvhandan fyri øll lesandi, sum gjørdust liðug á Fróðskaparsetrinum. Handanin var í Norðurlandahúsinum og allar deildir vóru umboðaðar. 98 lesandi fingu prógv hendan dagin, har eisini fyrsta masterprógvið í løgfrøði varð handað.

Felags prógvhandan er liður í at skapa ein felags samleika fyri Setrið.

### *Felags innleiðsla fyri nýggj lesandi*

Skipað varð í ár fyri felags innleiðslu fyri nýggj lesandi fyri fyrstu ferð, har lesandi fingu høvi til at heilsa upp á hvønn annan í einum avbjóðandi og hugnaligum umhvørvi.

### *Temadagur: tann lesandi í miðdepilin*

Hósdagin 19. september var temadagur við heitinum “Tann lesandi í miðdeplinum” hildin fyri leiðslu, undirvísarum og umboðum fyri lesandi. Dina Andersen, verkætlanarleiðari av verkætlanini “Den studerende i centrum” á Syddansk Universitet, stóð fyri temadegnum, sum snúði seg um universitetsdidaktikk, har serliga evnini lestrarbyrjan og undirvísingar- og próvtøkuhættir vóru á skránni.

### *Setursdagur*

20. mai varð skipað fyri Setursdegi. Kári á Rógvi og Bogi Bech Jensen høvdu professarafyrilestrar, umframt styttri innlegg frá megindeildunum.

### *Setan av fyriskipanarbólki til 50 ára hátíðarhald*

Ein fyriskipanarbólkur er settur at fyriskipa hátíðarhaldið í sambandi við, at Fróðskaparsetrið fyllir 50 ár 20. mai í 2015. Hátíðarhaldið verður í Norðurlandahúsinum.

# Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi

## *Útbúgving*

Námsvísindadeildin (NÁD) skipaði í 2013 og 2014 fyri eftirútbúgving av námsfrøðingum og fólkaskúlalærarum, partvíst sum ískoytisútbúgving til bachelor og sum linjulestur saman við lesandi á deildini.

Endamálið við ískoytisútbúgvingini er at geva námsfrøðingum og fólkaskúlalærarum, ið eru útbúnir eftir eldri skipanum, møguleika til at uppstiga eldru útbúgvingina til bachelor og at geva teimum møguleika til framhaldandi hægri lestur innan námsfrøði og undirvísing.

Linjulestur er tilboð til útbúnar lærarar, sum – um pláss er fyri hesum – kunnu koma á deildina og taka eina linju saman við lesandi á deildini móti einum ávísum gjaldi fyri hvørt ECTS-stig.

Í 2012 vóru fyrstu námsfrøðinga- og læraralesandi eftir broyttu skipanini frá 2008 liðug við sína útbúgving. Á vári í 2013 varð farið undir at eftirmeta útbúgvingarnar, og helt hetta arbeiðið fram í 2014.

Føroyamálsdeildin (FMD) hevði aftur í 2014 eitt skeið samansett av netundirvísing og floksundirvísing í føroyskum fyri ensktalandi. Skeiðið fekk góða undirtøku. FMD hevði somuleiðis Nordkurs-summarskeið (10 ECTS) fyri o.u. 25 norðurlendskum móðurmálsstudentum. Nordkurs er fíggjað av Norðurlendska ráðharraráðnum. Haraftrat helt FMD Altjóða summarskeið (10 ECTS) í føroyskum fyri o.u. 30 studentum úr mongum londum; Altjóða summarskeiðið er gjaldskeið. Summarskeiðini vardu 3 vikur hvørt. FMD hevur síðan 1970-árini hildið Nordkurs-skeið og síðan 2004 altjóða summarskeið.

Undirtøkan fyri skeiðunum hevur verið góð og vaksandi.

Íslandsnevndin á Fróðskaparsetrinum og Føroyanevndin við Háskóla Íslands hildu í januar felagsfund á Fróðskaparsetrinum um samstarv sítt. Samstarvið heldur tvørvísindaliga ráðstevnu, Frændafund, triðja hvørt ár í Føroyum og Íslandi til skiftis og gevur út ráðstevnuritið við sama navni. Á felagsfundinum varð samstarvið eftirmett og avgjørt var at taka stig til at javnlíkameta ráðstevnuritið.

Søgu- og samfelagsdeildin (SSD). Á deildini hevur verið arbeitt við fyrireika tríggjar nýggjar masterútbúgvingar í Søgu, Sosialvísindum og samfelagsplanlegging og Politikk og umsiting, sum skulu bjóðast út í 2015. Harumframt hevur arbeitt verið við at fyrireika masterútbúgvingina West Nordic Studies, sum er grundað á samstarv millum Fróðskaparsetrið og fýra universitet í Útnorðri, t.e. universitetini í Nuuk, Reykjavík, Akureyri og Bodø. Útbúgvingin skal bjóðast út í 2015. Eisini hevur nógv arbeiðsorka verið brúkt uppá at endurskoðað tær tríggjar verandi bachelorútbúgvingarnar innan Søgu, Sosialvísindi og samfelagsplanlegging og Politikk og umsiting, sum eisini skulu bjóðast út í 2015. Tað økta

virksemið hevur havt við sær, at eitt vísindastarvsfólk er sett innan samfelagsvísindi og eitt innan løgfrøði. Harumframt er ein granskari settur í fyribils eitt ár at taka sær av at fyrireika og reka West Nordic Studies. At enda er ein adjunktur settur at fyrireika eina bachelorútbúgving í búskaparfrøði.

Í samband við verkætlanina "Føroyar í 1800 talinum", varð skipað fyri einum seminari á deildini, har fólk frá fleiri granskingar- og útbúgvingarstovnum í Føroyum luttóku. Eitt vísindaligt hjálparfólk hevur síðan 2013 verið í tíðaravmarkaðum starvi í sambandi við hesa verkætlanina.

Setrið hevur keypt greiningarforritið Nvivo til granskarar, undirvísarar og lesandi á Setrinum. Nvivo er eitt forrit til greining av kvalitativum dátum og verður brúkt á nógvum universitetum kring heimin. Talan er um eitt sera gott og brúkaravinarligt amboð til gransking. Lesandi eisini frálæru í at brúka Nvivo. Umboð fyri Søgu- og Samfelagsdeildina samskipa frálæruna fyri granskarar og undirvísarar.

## *Gransking á Søgu- og samfelagsdeildini*

Umframt útbúgvingarnar er gransking ein hornasteinur á Søgu- og Samfelagsdeildini, og granskingarevnini eru fleiri. Serligan áhuga hava t.d. viðurskiftini í Føroyum í 1800-talinum, politiska søgan í fyrru helvt av 20. øld, fiskivinna, korini hjá smásamfeløgum, bæði viðvíkjandi politikki, arbeiðsmarknaði og fíggjarligu treytirnar hjá vinnuvirkjum. Harumframt verður granskað í búskaparfrøði, grønari orku, kyn, migratión, mobilitet, transnationalisma og ung og í løgfrøði. Føroyar í 1800 talinum er verkætlan, sum er fíggjað av Granskingarráðnum. Eisini verður granskað breitt innanfyri mentan og mentanarfrøði. Samanhangurin í granskingini á Søgu- og Samfelagsdeildini kann samlast undir heitinum burðardygg samfelagsmenning.

## *Gransking á Føroyamálsdeildini*

**Verkætlan um tekstslagið ferðafrásagnir.** Ph.d.-verkætlan, sum granskar ferðafrásagnir søguliga og ástøðiliga. Hon leggur serligan dent á ferðafrásagnirnar hjá Kristiani Osvald Viderø.

***Føroysk bókmentasøga 2* frá 1900 til 1960.** Henda gransking er framhald av *Føroyskari bókmentasøgu 1* fram til 1900, sum kom út í 2011 á Námi.

**"Norlyr – Netværket nordisk modernistisk lyrik"** – granskingarsamstarv um norðurlendskar yrkingar eftir 1960.

**Dialektbroytingar ígjøgnum tvey ættarlið: Hvussu, hvussu skjótt og hví?** Endamálið er at royna at fáa innlit í, um føroyskar dialektir eru í broyting og at kanna viðurskiftini millum

samfelagsbroytingar og málbroytingar. Verkætlanin verður gjørd í samstarvi við universitetið í Bergen.

**Social Conditions for Language Change.** Hetta er ein norðurlendsk verkætlan, har spurt verður: Í hvønn mun ávirka samfelagsbroytingar málbroytingar.

**Máltøka hjá føroyskum børnum.** Ph.d.-verkætlan, ið hevur til endamáls at gera eina skipaða, empiriskt grundaða lýsing av, hvussu føroysk børn menna málið. Kanningarúrslitini kunnu harumframt nýtast til at samanbera málmenning hjá føroyskum børnum við menningina hjá børnum aðrastaðni, av tí at kanningarhátturin, sum verður brúktur í verkætlanini, eisini verður nýttur í umleið 60 øðrum londum. Verkætlanin verður framd í samstarvi millum Fróðskaparsetrið og Syddansk Universitet. Verkætlanin verður fíggjað av Granskingarráðnum, Syddansk Universitet og Sernámi.

**Faroese Online** er ein samstarvsverkætlan hjá granskarum á Føroyamálsdeildini og Háskóla Íslands. Hon varð stovnað á Fróðskaparsetrinum í september 2014 og snýr seg um at skapa tilfar til sjálvsnám í føroyskum á netinum til útlendingar.

## *Gransking á Námsvísindadeildini*

Gransking á Námsvísindadeildini er innan námsfrøði og undirvísing, og í fleiri ár hevur verið arbeitt fram ímóti at økja um granskingarvirksemið á deildini. Í 2014 varð økt um granskingarførleikan á deildini við at fýra adjunktar vórðu settir í starv innan økini móðurmálsnám og undirvísingarfrøði, námsfrøðiliga fyrisiting og leiðslu, støddfrøði og lívfrøði & náttúru/tøkniundirvísing, umframt at tríggjar ph.d.-verkætlanir vóru settar í gongd innan ávikavist støddfrøði, undirvísing í enskum og innan læraraútbúgving.

Niðanfyri eru dømi um granskingarevni á Námsvísindadeildini í 2014:

**PISA kannar førleikar, ROSE kannar hugburð** - OECD skipar fyri PISA kanningum av førleikum teirra 15 ára gomlu. Kanningin umfatar førleikarnar í fleiri tættum, harímillum hvussu tey duga náttúrufak samanborið við javnaldrar í øðrum londum.

ROSE (the Relevance Of Science Education) er eitt annað slag av kanning, sum viðger hvønn týdning undirvísing í náttúruvísindum hevur. Ungdómar í 40 londum hava svarað einum stórum spurnablaði um, hvat tey hava hug at læra innan náttúruvísindi, hvørjar framtíðarætlanir tey hava, hvat tey gera í frítíðini, og hvat tey meina um umhvørvi, náttúruvísindi og tøkni. Námsvísindadeildin skipar fyri føroyska partinum av ROSE-kanningini.

**Undirvísing og læring** - Verkætlanin byrjaði í 2011 og er eitt samstarv millum Námsvísindadeildina og Kennaradeildina á Háskóla Íslands. Kanningarúrslitini, sum umframt

at tey kunnu samanberast við íslendsk kanningarúrslit, kunnu geva okkum størri innlit í tað, sum gongur fyri seg í fólkaskúlanum í dag. Hvat slag av læring og undirvísing fáa børnini? Hvat halda tey um hesa undirvísingina? Hvat kundu tey hugsað sær var øðrvísi? Talan er um stóra spurnakanning, sum fatar um allar 7., 8. og 9. flokkarnar í landinum.

**Innskúling** – Verkætlan, ið snýr seg um skiftið millum barnagarð og skúla. Ætlanin er at fylgja einum skúlabólki í barnagarðinum í tvey ár, meðan tey ganga í skúlabólki og í 1. flokki.

**Ung fólk** - Verkætlanin er eitt granskingarsamstarv, sum byrjaði í 2010. Tilfarið er savnað í stórari spurnakanning í fólkaskúlum í Føroyum og Íslandi. Kanningin hyggur serliga at heilsu, frítíð og trivnaði hjá ungdómi í 15-16 ára aldri.

**Linjufaksskipanin á Námsvísindadeildini** – Kanning, sum fevnir um, í hvønn mun lærarar undirvísa í teim linjufakum, teir hava lisið á Læraraskúlanum. Eisini verður nortið við eftirmetingar fólkaskúlans, serliga við atliti at fráfaringarroyndunum í 9. flokki. Fólkaskúlin fer yvir til nýggjan próvtalsstiga, og í tí sambandi er ætlanin at gera komparativar analýsur av, um nýggi stigin gevur aðra heildarmynd av fakliga støði næminga.

**Reflektións- og samskiftismiðling í starvslærutíðini** - Læraralesandi skulu í starvslæru í útbúgvingartíðini. Í starvslærutíðini undirvísa tey næmingum í fólkaskúlanum, samstundis sum tey sjálv eru lesandi. Tey nýta starvslæruna sum ein royndarpall, har ástøðilig-, fakligog praksisvitan hittast. Í hesi verkætlan verður høvuðsdenturin lagdur á skrivliga samskiftið millum tey lesandi, har teirra egna læring gjøgnum royndir og refleksiónir, bæði persónliga og í samstarvi við floksfelagar, gerst eksplisit og atkomilig hjá øðrum. Samskiftið fer fram á persónligum, óalmennum bloggum, har nógvir ymsir málbúnar so sum tekstur, myndir, filmur, ljóð o.s.fr. kunnu brúkast. Kannað verður, hvussu hesir nýggju, tøkniligu møguleikar rigga sum samskiftispallur.

### *Samstarvsavtalur*

Samstarvsavtala er undirskrivað millum Fróðskaparsetrið og Sapienza university í Rom. Tað hendir í sambandi við, at Søgu- og samfelagsdeildin og Facoltà di Lettere e Filosofia á Sapienza university hava ætlanir um granskingarsamstarv og undirvísing í føroyskari miðaldarsøgu.

# Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi

## *Útbúgving*

Í 2014 varð komið á mál við at skipa útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing eftir Bologna-leistinum.

Sjúkrarøktarfrøðideildin stílar fyri ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði, sum telur 30 ECTS. Endamálið við útbúgvingini er at geva sjúkrarøktarfrøðingum, ið eru útbúnir eftir eldri skipanum, møguleika til at uppstiga eldru útbúgvingina til bachelor, og at geva heilsustarvsfólki við aðrari heilsufakligari miðallangari framhaldsútbúgving akademiska ískoytisútbúgving á bachelorstigi.

Í 2013 varð farið undir at fyrireika eina nýggja masterútbúgving innan heilsuvísindi. Arbeiðið helt áfram í 2014. Umframt omanfyrinevnda útbúgvingarvirksemi hevur Sjúkrarøktarfrøðideildin bjóðað stakskeið á master og ph.d. stigi. Eitt masterskeið à 15 ECTS varð bjóðað í ár. Eins og tvey ph.d. skeið vórðu fyriskipað av Sjúkrarøktarfrøðideildini í 2014.

Í 2014 vóru lesandi upptikin til KT-verkfrøði og Lívfrøði. Útbúgvingin í KT-verkfrøði samstarvar við Mittuniversitetet í Svøríki, so at lesandi í KT-verkfrøði kunnu taka skeið har sum fjarlestur, ið er partur av útbúgvingini á Setrinum. Ein munandi partur av undirvísingini fer fram við hesum fjarlestrarmøguleika.

Í 2013 varð arbeitt við at nýskipa lívfrøðiútbúgvingina og í 2014 varð lívfrøðiútbúgvingin bjóðað eftir nýggja leistinum, soleiðis at nú ber til at taka tríggjar útbúgvingar, ið hava felags undirvísing út ímóti 1½ ári, fyri síðan at greinast í tríggjar sjálvstøðugar leiðir: vistfrøði, havlívfrøði og mýlska lívfrøði.

Náttúruvísindadeildin hevur í nøkur ár í samstarvi við Bergens Universitet, Århus Universitet og Háskóla Íslands bjóðað eina felags norðurlendska 2 ára masterútbúgving: “The Joint Nordic Master's Programme in Marine Ecosystems and Climate”. Vegna ov lítla undirtøku fyri útbúgvingini varð hon bjóðað fyri seinastu ferð í 2014.

## *Gransking á Náttúruvísindadeildini*

**Aldu- og streymviðurskifti við Føroyar -** Í samstarvið við Landsverk hevur verið kannað, hvussu ofta vegurin til klaksvíkstunnilin kundi væntast at verða stongdur vegna brim. Hugt hevur verið eftir viðurskiftunum 50 ár aftur í tíðina. Kanningarnar vórðu grundaðar á aldu-, vatnstøðu- og lufttrýstmátingar umframt sjóvarfall og modellúrslit.

**Orkuviðurskifti í Føroyum** - Eitt modell fyri samanspælið millum ymiskar varandi orkumøguleikar í Føroyum er ávegis.

Samanberingar av ymisku varandi orkusløgunum benda á, at orka frá sjóvarfalsstreymi er meiri støðug upp á styttri sikt enn vindur, sól og alda. Hinvegin eru dagarnir við spøkum streymi ein avbjóðing fyri hetta orkuslag.

**Vatngóðska innan aling á sjónum** - Í ph.d.-verkætlan verður arbeitt við modelli fyri eitt alibrúk við fleiri nótum, umframt at kanna ávirkanina frá fiskinum á rákið og súrevnisnøgdina í sjónum. Málið við verkætlanini er at fáa neyvan kunnleika um, hvussu útgerð og fiskur ávirka aliumhvørvið í nótunum í einum alibrúki á sjónum á bæði vardum økjum inni á firðunum og á meiri streymhørðum økjum.

Verkætlanin verður framd í samstarvi millum Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum, Fiskaaling, SINTEF Fiskeri og Havbrug í Noregi og alivinnuna í Føroyum. Verkætlanin verður fíggjað av p/f Fiskaaling, Granskingarráðnum og norska SINTEF.

**Gransking í evnafrøði og lívtøkni -** Náttúruvísindadeildin luttekur í verkætlanum, sum kunnu bólkast undir evnafrøði og lívtøkni. Hesar granskingarverkætlanirnar umfata eitt nú fitisýrur í fiski, lívvirkin peptid í fiskarestrávørum, bindivevnað í laksaflaki, mikrosatellitar og 'snipsar' (SNPsar). Mikrosatellitar eru ikki-kotandi partar av DNA-mýlinum. SNP er stytting fyri: Single Nucleotide Polymorphism.

## *Gransking á Sjúkrarøktarfrøðideildini*

Gransking á Sjúkrarøktarfrøðideildini er á heilsuøkinum og í fleiri ár hevur verið arbeitt fram ímóti at økja um granskingarvirksemi á deildini. Fram til 2013 var granskingin innan sjúkrarøktarfrøði við denti m.a. á fyribrigdir í smásamfeløgum. Í 2014 varð økt um granskingarførleikan á deildini við at tveir adjunktar vórðu settir í sjúkrarøktarfrøði og ein ph.d. verkætlan innan sjúkrarøktarfrøði varð sett í gongd. Farið varð eisini undir raðfestingar av øðrum heilsuvísindaligum førleikum enn sjúkrarøktarfrøði og sum ein liður í hesum varð ein lektari í human fysiologi settur, hvørs gransking fevnir um m.a. samband millum rørslu og heilsu.

Niðanfyri eru dømir um granskingarevnir á Sjúkrarøktarfrøðideildini í 2014:

**Børn sum avvarðandi hjá foreldrum við álvarsamari sálarsjúku -** Hetta er ein verkætlanini, sum hevur til endamáls at útvega vitan um, hvussu børn hjá foreldrum við álvarsamari sálarsjúku uppliva og megna tilveruna. Verkætlanin er ein viðgerð og syntesa av úrslitum úr 22 altjóða vísindaligum greinum.

Av tí, at Føroyar eru eitt sokallað "small scale society" og tí ikki beinleiðis kann samanberast við onnur størri lond, er ætlanin at fara undir kanning av, hvussu føroysk børn uppliva og megna at vera avvarðandi hjá foreldrum við álvarsamari sjálarsjúku.

**Humanfysiologisk gransking -** Gransking í humanfysiologi hevur seinastu árini ment seg til ein sterkan og avgerandi part av vísindaligari gransking á Setrinum. M.a. er eitt

arbeiðsfysiologiskt laboratorium ment á granskingarsetrinum iNOVA, sum Setrið stendur fyri og nógvar vísindaligar javnlíkamettar greinar eru almannakunngjørdar í góðum og høgt mettum altjóða tíðarritum, sum viðgera humanfysiologisk evni. Eisini er føroysk humanfysiologisk gransking kend úti í heimi, og er í fleiri førum umrødd í miðlum uttan fyri Føroyar.

**Gransking innan kost og umhvørvi -** Heilsa og sjúkravandi verða á fleiri ymiskar hættir ávirkað av tí umhvørvi, vit eru ein partur av, og av hvussu vit liva. Setrið ynskir at raðfesta gransking, ið kannar slík sambond, serliga innan kost og umhvørvi.

Miðað verður eftir at seta í verk eina kanning av kosti, ið ung í Føroyum eta, sambondini við teirra heilsustøðu, og hvussu kosturin er tongdur at sosialu støðuni í familjum teirra. Umframt at geva okkum vitan um støðuna hjá ungum í Føroyum í dag, leggur ein slík kanning eisini lunnar undir framtíðar gransking í kosti, heilsu og sosialari støðu.

Gransking innan júst hesi evni hevur eisini í fleiri áratíggju verið kjarnin í vísindaliga arbeiðinum á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, sum ígjøgnum Pál Weihe, professara í Fólkaheilsu, eisini er knýtt at Setrinum.

## *Samstarvsavtalur*

Í mars 2014 undirskrivaði Fróðskaparsetrið samstarvsavtalu við Landssjúkrahúsið og við Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu. Endamálið við samstarvsavtalunum er at menna heilsuvísindaliga gransking og útbúgving í Føroyum.

# Útbúgvingar og lesandi

## *Útbúgvingar*

Í talvuni niðanfyri síggjast útbúgvingarnar, sum vórðu bodnar út í 2014. Allar útbúgvingar eru skipaðar eftir altjóða leisti og geva atgongd til víðari lestur uttanlands.

Talva 1: yvirlit yvir útbúgvingar bodnar út á Fróðskaparsetrinum í 2014 (bachelor, master og hjánám)

| | | |
|---|---|---|
| Lærara | B.Ed. | 4 ára nám – starvsvenjing er partur av lestrinum |
| Námsfrøði | B.Ed. | |
| Sjúkrarøktarfrøði | B.Sc.Cur. | |
| Søga | B.A. | 3 ára nám við samlestri fyrsta árið |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging | B.S.Sc. | |
| Politikkur og umsiting | B.S.Sc. | |
| Mál og bókmentir | B.A., M.A., hjánám | Undirvísing í føroyskum máli og bókmentum á øllum stigum |
| Lívfrøði | B.Sc. | 3 ára nám |
| KT-verkfrøði | B.Sc. | 3 ára nám |
| Vegleiðing | M.A. | 2 ára nám, parttíðarlestur |
| Løgfrøði | M.A. | 2 ára nám |

Kelda: Próvbókin, Fróðskaparsetur Føroya.

## *Lesandi 2014*

Talva 2: Yvirlit yvir øll lesandi á Fróðskaparsetrinum í 2014, býtt á útbúgvingar

| **Útbúgvingar** | **Stytt heiti** | **Tal av lesandi** |
|---|---|---|
| Lærari | B.Ed. | 154 |
| Námsfrøði | B.Ed. | 137 |
| Mál og bókmentir | B.A. | 36 |
| Mál og bókmentir | M.A. | 9 |
| Søga | B.A. | 40 |
| Politikkur og umsiting | B.S.Sc. | 35 |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging | B.S.Sc. | 40 |
| Samfelagsvísindi | B.S.Sc. | 22 |
| Lívfrøði | B.Sc. | 19 |
| KT-verkfrøði | B.Sc. | 51 |
| Sjúkrarøktarfrøði | B.Sc.Cur. | 89 |
| Orka og umhvørvisverkfrøði | B.Sc. | 11 |
| Vegleiðing | M.A. | 32 |
| Almannafyrisiting | Diplom | 2 |
| Løgfrøði | M.A. | 37 |
| **Lesandi til samans** | | **714** |

Kelda: Próvbókin 10. oktober, 2014. Fróðskaparsetur Føroya.

Talva 2 vísir, hvussu tey lesandi á Fróðskaparsetrinum eru býtt á útbúgvingar. Nógv flest lesandi eru á NÁD, ið hvørt ár tekur inn stórar árgangir á báðum útbúgvingunum. Eisini SFD tekur eitt støðugt høgt tal av nýggjum lesandi inn á hvørjum ári. Talvan vísir, at fleiri aðrar útbúgvingar eisini eru vælumtóktar og draga at sær nógv lesandi.

Av teimum lesandi á Fróðskaparsetrinum eru meira enn tveir triðingar kvinnur. Tað eru serliga útbúgvingarnar á NÁD og á SFD, ið hava nógv kvinnulig lesandi. Á NVD er meirilutin av teimum lesandi menn, ímeðan kynsbýti ímillum lesandi á SSD og á FMD er javnari.

## *Ph.d. verjur*

Tvær ph.d. verjur vóru á Fróðskaparsetrinum hetta árið.

- Hilmar Simonsen vardi ph.d. verkætlanina: "Processing and geologic interpretation of reflection-seismic data from the Glyvursnes" og
- Uni Petersen vardi ph.d. verkætlanina: "Vestmanna seismic tie Propagation and scattering of reflection seismic waves in a basalt succession".

# Fíggjarviðurskiftir

Talva 3: Roknskapur fyri Fróðskaparsetrið 2014.

| **Inntøkur** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** |
|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan frá løgtinginum | 71.752.000 | 67.252.000 | 68.797.000 | 68.047.000 |
| Sølu inntøkur v.m. | 1.201.290 | 1.371.056 | 1.229.922 | 1.248.239 |
| Flytingar inntøkur millum almennar stovnar | 3.392.899 | 1.391.009 | 673.736 | 1.439.674 |
| Flytingar inntøkur frá kommunum | 1.608.950 | 1.906.405 | 1.746.713 | 1.639.594 |
| **Inntøkur til samans** | **77.955.139** | **71.920.470** | **72.447.371** | **72.374.507** |
| **Lønarútreiðslur til starvsfólk** | | | | |
| Mánaðarlønir | 47.159.813 | 43.642.019 | 42.678.548 | 41.095.839 |
| Tímalønir | 4.471.994 | 4.185.911 | 3.805.232 | 2.869.909 |
| Samsýningar v.m. | 2.262.861 | 2.176.320 | 2.462.148 | 2.303.527 |
| Eftirlønir og amb-gjøld | 8.887.945 | 8.098.684 | 7.946.421 | 7.279.618 |
| Endurgjald fyri lønir | 140.225 | -1.232.203 | -48.651 | 616.975 |
| **Lønarútreiðslur til samans** | **62.922.838** | **56.870.731** | **56.843.698** | **54.165.868** |
| **Húsaleiga v.m.** | | | | |
| Húsaleiga og viðlíkahald | 2.808.058 | 2.443.300 | 2.471.839 | 2.394.371 |
| El | 864.207 | 858.652 | 813.838 | 899.660 |
| Olja | 1.137.319 | 1.371.280 | 1.657.057 | 1.365.058 |
| **Húsaleiga v.m. til samans** | **4.809.584** | **4.673.232** | **4.942.734** | **4.659.089** |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | | | |
| Skrivstovuhald v.m. | 7.093.643 | 6.773.611 | 6.316.293 | 7.466.562 |
| Umboðan | 460.003 | 610.928 | 722.096 | 507.698 |
| Ferðing og flutningur v.m. | 1.310.103 | 1.425.646 | 1.708.627 | 2.005.456 |
| Keyp av útbúnaði | 1.092.881 | 1.120.957 | 1.403.422 | 2.586.030 |
| Stuðul | 242.907 | 295.395 | 176.397 | 141.000 |
| Aðrar rakstar útreiðslur | 62.792 | 80.401 | 52.308 | 581.500 |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur til samans** | **10.262.329** | **10.306.938** | **10.379.143** | **13.288.246** |
| **Útreiðslur til samans** | **77.994.751** | **71.850.901** | **72.165.575** | **72.113.203** |
| **Ársúrslit** | **-39.612** | **69.569** | **281.796** | **261.304** |

Kelda: Fíggjardeildin, Fróðskaparsetur Føroya.

# Leiðsla og stýri

## *Leiðsla*

- Sigurð í Jákupsstovu, rektari, cand.polyt., ph.d.
- Hans Pauli Joensen, dekanur á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi, cand.scient og lektari
- Malan Marnersdóttir, dekanur á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi, cand.mag, dr.phil, professari í bókmentum
- Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri, cand.mag.

## *Stýrið við ársenda 2014*

- Herálvur Joensen, stýrisformaður, stjóri í Føroya Reiðarafelag
- Jan Mortensen, næstformaður, privatkundastjóri á Føroya Tele
- Juanna Schröter Joensen, lektari við lærda háskúlan í Stockholm
- Tove Bull, professari í málfrøði við lærda háskúlan í Tromsø
- Gestur Hovgaard, starvsfólkaumboð, lektari á Søgu og Samfelagsdeildini
- Sára Joensen, starvsfólkaumboð, skrivari á Føroyamálsdeildini
- Vibeke Michaelsdóttir, lesandi á Námsvísindadeildini

# Vísindaligar útgávur

## Javnlíkamettar (Peer reviewed)

1. **Andreassen, E.** (2014). Ævintýr (188 pages). Tórshavn: Fróðskapur.

2. Connolly, L., **Mohr, M.**, Scott, S., Ermidis, G., Julian, R., Bangsbo, J., Junge, A., Dvorak, J., Jackman, S., Bowtell, J., Knapp, K., Krustrup, P. and Fulford, J. (2014). Effects of small-volume football and whole-body vibration training on body composition and cardiovascular health markers for sedentary premenopausal women. *Journal of Sport and Health Science* 3(4), pp. 1-9.

3. Eilers, S., **Restorff, G**. & Ruiz, E. (2014). The ordered *K*-theory of a full extension. *Canadian Journal of Mathematics*, 66 (3), pp. 596–625.

4. Falkenberg, S. S., **Mikalsen, S-O.**, **Joensen, H.**, Stagsted, J., Nielsen, H.H. (2014). Extraction and characterization of candidate bioactive compounds in different tissues from salmon (*Salmo salar). International Journal of Applied Research in Natural Products*, 7 (4), pp. 11-25.

5. Girard, O., Nybo, L., **Mohr, M.**, and Racinais, S. (2014). Plantar flexor neuromuscular adjustment following football match-play in hot and cool condition. *Scandinavian Journal of Medicine and Science in Sports, 25 (Supplementum 1)*, pp. 154-163.

6. **Haanes, G. H.**, Kirkevold, M., Horgen, G., Hofoss, D., Eilertsen, G. (2014). Sensory impairments in community health care: a descriptive study of hearing and vision among elderly Norwegians living at home. *Journal of Multidisciplinary Healthcare*, 7:217-225.

7. **Hovgaard, G., Jákupsstovu, B. í og Sølvará, H. A.** (eds.) (2014). *Vestnorden – nye roller i det internationale samfund* (192 pages). Tórshavn: Fróðskapur.

8. **Isholm, E.** (2014). Tá ið amtmaðurin fór at keypa epli - dømi um leiklutin hjá tí almenna í broytingunum í 19. øld. *Fróðskaparrit*, 61, pp. 53-82. Tórshavn: Fróðskapur.

9. **Jacobsen, J. í L.** and **Petersen, H. P.** (2014). Fyrisetingin fyri í føroyskum. In: Bloch, D. og Jacobsen, E. S. (eds.) *Fróðskaparrit,* 61, pp. 137-162 (book). Tórshavn: Fróðskapur.

10. **Joensen, H.** and Grahl-Nielsen, O. (2014). Distinction among North Atlantic cod Gadus morhua stocks by tissue fatty acid profiles. *Journal of Fish Biology*, 84, pp. 1904–1925.

11. **Joensen, J. P.** (2014). Nordiske blikk på norsk fakhistorie. Norsk fakhistorie – sett fra Færøyane. Tidskrift for kulturforskning 1-2, pp. 50-55. Oslo: Novus forlag.

12. **Miðskarð, J.** og Berding, J. (2014). A conceptualization of interprofessional work inspired by Hannah Arendt's line of thinking. *Journal of Social Intervention: Theory and Practice*, 23 (2), pp. 38-51. https://www.journalsi.org/articles/abstract/10.18352/jsi.391/

13. **Mikalsen, S-O.** (2014). Proteomics made more accessible. *Proteomics,* 14:989-990.

14. **Mohr, M.**, Lindenskov, A., Holm, P. M., Nielsen, H. P., Mortensen, J., Weihe, P., and Krustrup, P. (2014). Football training improves cardiovascular health profile in sedentary

premenopausal hypertensive women. *Scandinavian Journal of Medicine and Science in Sports. 24 (Supplementum 1)*, pp. 36-42.

15. **Mohr, M.**, Nordsborg, N. B., Lindenskov, A., Steinholm, H., Nielsen, H. P., Mortensen, J., Weihe, P. and Krustrup, P. (2014). High-intensity intermittent swimming improves cardiovascular health status for women with mild hypertension. *BioMedical Research International* 2014, 728289, pp. 1-9.

16. Pettersen, S. A., Krustrup, P., Bendiksen, M. B., Randers, Brito, J., Bangsbo, J., Jin, Y., and **Mohr, M**. (2014). Effects of caffeine intake on match performance in soccer. *Journal of Sport Sciences* 32 (20), pp. 1958-1965.

17. **Mohr, M.**, and Iaia, F. M. (2014). Physiological Basis of Fatigue Resistance Training in Competitive Football. *Sports Science Exchange* 27 (4), pp. 1-9.

18. **Petersen, H. P.** & Adams, J. (2014). Faroese. A Language course for beginners. Tórshavn: Stiðin.

19. Pujolar, J. M., Jacobsen, M. W., Als, T. D., Frydenberg, J., **Magnussen**, **E.,** Jonsson, B., Jiang, X., Cheng, L., Bekkevold, D., Maes, G. E, Bernatchez, L. and Hansen, M. M. (2014). Assessing patterns of hybridization between North Atlantic eels using diagnostic single-nucleotide polymorphisms. Heredity, 112: 627-637.

20. Rasmussen, J., Nielsen, O. W., Janzen, N., Duno, M., **Gislason**, **H.,** Køber, L., Steuerwald, U., Lund, A. M. (2014). Carnitine levels in 26,462 individuals from the nationwide screening program for primary carnitine deficiency in the Faroe Islands. *Journal of Inherited Metabolic Disease*, vol. 37, pp. 2015-222. Doi:10.1007/s10545-013-9606-2

21. Rasmussen, J., Lund, A. M., Risom, L., Wibrand, F., **Gislason**, **H**., Nielsen, O. W., Køber, L. and Duno, M. (2014). Residual OCTN2 transporter activity, carnitine levels and symptoms correlate in patients with Primary Carnitine Deficiency. *Molecular Genetics and Metabolism Reports*, vol. 1, pp. 241-248. http://dx.doi.org/10.1016/j.ymgmr.2014.04.008

22. **Róin, Á.** (2014). Embodied ageing and categorisation work amongst retirees in the Faroe Islands. *Journal of Aging Studies*, 31:83-92.

23. **Sigurðardóttir, T.** (2014). The Role of Translation in a Minor Literary Language. In: Lothe, J., Eysteinsson, Á. & Jansson, M. (Eds.). *Nordic Responses, Translation, History, Literary Culture*, pp. 89-98.

24. **Sølvará, H. A.** (2014). *Frá sjálvstýri móti loysing – donsk-føroysk viðurskifti frá 1906 til 1925 við serligum atliti at radikaliseringini av tjóðskapar- og sjálvstýrisspurninginum* (480 pages). Tórshavn: Fróðskapur.

25. **Sølvará, H. A.** (2014). Aufstand in Klaksvík - die Anstellung eines Arztes, die zum Aufstand führte. *Tjaldur* 52/53, pp. 10-44. Mülheim/Ruhr: Deutsch-Färöischen Freundeskreises.

26. Wei, C. L., **Xin, Q**., and Yao, X. L. (2014). Cross-layer Optimization in Cognitive Radio Cellular Networks with applications in Railway Sensing Systems. *International Journal of Computational Information Systems 10* (11), pp. 4667-4674.

27. **Weyhe, E.** (2014). Ániasartáttur – ein uppskrift á suðuroyarmáli. *Fróðskaparrit 61,* pp. 91-115. Tórshavn: Fróðskapur.

28. **Weyhe, E.** (2014). Akrinatjørn, Mølbursvatn og Mølheyggjarnir – trý staðarnøvn á Sandi. *Fróðskaparrit 61*, pp. 84-90. Tórshavn: Fróðskapur.

29. **Weyhe, E.** (2014). Variatión av i og u í herðingarveikari støðu í føroyskum. *Fróðskaparrit 61,* pp. 116-136. Tórshavn: Fróðskapur.

30. **Xin, Q.**, Manne, F., Yao, X. (2014). Latency-optimal communication in wireless mesh networks. *Theoretical Computer Science*, 528:79-84.

31. Yu, C. W., **Xin, Q**., Chilamkurti, N. and Jiang, S. M. (2014). Special Issue on Algorithm and Theory for Robust Wireless Sensor Networks. International Journal of Distributed Sensor Networks, Volume 2014 (Book - 212 pages). Cairo/London/New York: Hindawi Publishing Corporation.

## Ráðstevnur (Conferences)

Framløgur á ráðstevnum eftir at úrtak hevur verið mett og góðkent:

32. **Fjallheim, A. S.** (2014): *Identification of Postnatal Depressions in a Small-Scale Society – A Mixed Method Investigation of Edinburgh Postnatal Depression Scale (EPDS) on the Faroe Islands.* International Marcé Society Biennial Scientific Meeting. Swansea University, Wales, UK, 10th to 13th of September.

33. **Mikalsen, S-O.**, Mortensen, M., Ziska, T., Norðberg, G., Jacobsen, Á., Eysturskarð, J., Djurhuus, D. D. (2014). *Potential use of mass spectrometry in salmon louse research*. Workshop organized by AG/EK-fisk/Nordic Council of Ministries. Tórshavn, Faroe Islands, 29th to 30th of April.

34. **Mikalsen, S-O.** (2014). *Non-targeted MS analyses in biomedical research, and potential approach for the selection of compounds to study in more detail*. Workshop organized by Joint Nordic Screening of Emerging Chemicals, Nordic Chemical Group and Working Group for Aquatic Ecosystems. Ystad, Sweden, 8th-9th of April.

35. **Róin, Á**. (2014). *Embodied ageing and categorisation work among retirees in the Faroe Islands*. The 8th international Conference on Cultural Gerontology, Galway, 10th to 13th of April.

## Aðrar vísindaligar útgávur (Other scientific publications)

Ritstjórnaðar greinar í øðrum miðlum eitt nú í heiðursritum, fak- og mentatíðarritum, frágreiðingar frá kanningum v.m.:

1. **Gislason, H.**, McVean, G., Andórsdóttir, G., Steig; B. á. (2014). Hagfrøðilig forkanning av frábrigdum í arvaeginleikum (DNA) í tí samlaða arvamassanum (genominum) hjá einum lítlum bólki av føroyingum. Góðkend genom-verkætlan av Vísindasiðsemisnevndini. Epidemiologiskar verkætlanir & forkanningarverkætlanir, nr. 21. Tórshavn: Ílegusavnið.

2. Iosjpe, M., Isaksson, M., **Joensen, H. P.**, Lahtinen, J., Logemann, K., Pálsson, S. E., Roos, P., Suolanen, V., Vartti, V.-P. (January 2014). Consequences of severe radioactive releases to Nordic Marine environment. NKS-B Radioactivity report: NKS-296. 96 pages. ISBN 978-87-7893-372-0. Nordic Nuclear Safety Research.

3. **Isholm, E.** (2014). Eplaskipið 1840 – tá tað almenna fór at keypa eplir. *Frøði* (3), pp. 26-31. Tórshavn, University of the Faroe Islands.

4. **Miðskarð, J.** (2014). Tann væleydnaða námsfrøðiliga ráðgevingargongdin. Tórshavn: Føroya Pedagogfelag. Tikið niður 20.02.2015 frá http://www.pedagogfelag.fo/uploads/media/Tann_vaeleydnada_namsfroediliga_radgevingargongdin

5. **Miðskarð, J.** (2014). Aðaltættirnir í námsfrøðiligum ráðgevingum. Tórshavn: Føroya Pedagogfelag. Tikið niður 20.02.2015 frá http://www.pedagogfelag.fo/uploads/media/Adaltaettirnir_i_namsfroediligum_radgevingum

6. **Niclasen, B. A.** (2014). Wave overtopping Leirvik. *NVDrit 2014:04*, Technical report. Tórshavn, University of the Faroe Islands.

7. **Olsen, E.**, Þórhallsdóttir, A. G., Wehn, S., Fosaa, A. M., Bjarnason, G., Mortensen, L., Patursson, B. Þorsteinsson, B., Simonsen, W., Patursson, J., Djurhuus, R., Dalsgarð, J. and Hoydal, K. (2014). *Sustainable grazing in subarctic environments with regard to vegetation and soil processes.* Report. Gramar Research, Tórshavn: pp. 1-76.

## Ph.d. verkætlanir

| Heiti á verkætlan | Lesandi | Høvuðsvegleiðari |
|---|---|---|
| The effects of climate and ocean currents on Faroe saithe | Eydna í Homrum | Bogi Hansen, adjung. professari |
| Vatngóðska innan aling á sjónum | Heini Winthereig Rasmussen | Knud Simonsen, lektari |
| Føroysk gøtunøvn – ein partur av føroysku staðarnøvnunum | Kristin Marjun Magnussen | Eivind Weyhe |
| Proteoglycans (PGs), glycosaminoglycans (GAGs) and collagen in the connective tissue of fish muscle | Ása Jacobsen | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| Bioactive peptides - extraction and processing methods for marine secondary | Durita Dahl Djurhuus | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| Spatial distribution of cod on the Faroe Plateau in relation to climate and other environmental conditions | Katharina Maj Ottesen | Eyðfinn Magnussen, lektari |
| Propagation and scattering of reflection seismic waves in a basalt succession | Uni Kárason Petersen | Jim Brown, professari |
| Processing and geologic interpretation of reflection-seismic data from the Glyvursnes-Vestmanna seismic tie | Hilmar Simonsen | Jim Brown, professari |
| Marine Climate Effects on Primary Production around the Faroe Islands | Sólvá Káradóttir Eliasen | Karin Margreta Húsgarð Larsen, Havstovan |
| Heima er ikki til - ferðafrásagnir K. O. Viderøs | Bergur D. Hansen | Malan Marnersdóttir, professari |
| Máltøka hjá føroyskum børnum | Sissal Rasmussen | Dorthe Bleses, Syddansk Universitet |
| Leaving the islands: Understanding Women´s Migration from the Faroe Islands | Karin Jóhanna Leitisstein Knudsen | Jørgen Ole Bærenholdt, RUC og Malan Marnersdóttir |
| Málslig menning og lesimenning/undirvísing hjá føroyskum børnum | Karolina Matras | Niels Egelund, Lund University |
| Ageing in the Faroe Islands. The construction of old age and the experience of ageing | Ása Róin | Catharina Nord og Elisabet Cedersund, Linkoping University |
| Identification of postnatal depressions in a small-scale society – A mixed method investigation of the validity of the Edinburgh Postnatal Depression Scale as a national screening instrument for postnatal depressions in the Faroe Islands | Anna Sofía Fjallheim | Kristianna Hammer, lektari |
| Ecology and production of *Calanus finmarchicus* in relation to environmental conditions in the southwestern Norwegian Sea | Inga Kristiansen | Høgni Debes, Adjungeraður lektari |

| | | |
|---|---|---|
| Teacher Cognition and English Teaching and Speaking in Grade 8 EFL classroom in the Faroes | Kalpana Vijayavarathan | Birgit Henriksen, adjung. prof./Susana Silvia Fernandez, prof., AAU |
| De pædagogiske fag i læreruddannelsen – formål, indhold og undervisningsmetoder | Hans Harryson | Firouz Gaini, lektari/Jens Rasmussen, prof.,DPU |